# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Standmyndin og Tróndardagar – frálík tiltøk

Leygardagin verður sannur hátíðardámur í Gøtu. Tá verður standmynd eftir Hans Paula Olsen reist at heiðra Trónd í Gøtu. Talan er um stórfingið hátíðarhald, Tróndardagar, í sambandi við avdúkingina og fara bæði løgmaður og biskupur at røða. Mentanin eftir Trónd livir og sæst í Gøtufólki enn tann dag í dag, og Gøta er søgurík og gomul bygd. Minnini um gøtuskeggjar eru partar av hesi søgu. Allar tjóðir hava sínar tjóðarhetjur – persónar, ið á einhvønn hátt hava myndað søguna og hava fingið eitt eftirmæli, ið ger, at hesir persónar standa sterkir í huga fólksins. Tróndur hevur verið og er umstríddur. Hetta hevur nakað at gera við ideologiska hugburðin hjá høvundanum til Føroyingasøgu. Kristniboðan føroyinga hevði eitt politiskt endamál og hetta endamál var at innlima frístatin Føroyar í Noregs ríki. Tann, sum var fyri hesum norska yvirvaldspolitikki, Sigmundur, verður av góðum grundum lýstur sum tann góða hetjan, meðan myndin av Trónda, á odda fyri mótstøðuni móti útlendskum yvirvaldi verður meira nuanserað. Minni Sigmundar er heiðrað við minnisvarðum, og tað er tí í tøkum tíma, at Tróndur nú fær standmynd.

Hóast vit í roynd og veru lítið ítøkiligt vita um mannin Trónd í Gøtu, so kunnu vit staðfesta, at hann hevur stóran symbolskan týdning fyri føroyingar og serstakliga fyri tann fullveldissinnaða partin av føroyingum. Øllum tjóðskaparørslum tørvar hetjur og tí verða mytur skaptar um hetjur. Myndin av hetjunum verður javnan endurskoðað alt eftir tíðarráki- og anda. Eisini kann søguliga granskingin verða medvirkandi til skiftandi hetjumyndir. Sjálvstýrisrørslan í Føroyum hevur nógvar hetjur, ið hava týðandi leiklut í tjóðarbyggingini. Nevnast kunnu Magnus Heinason, Nólsoyar Páll, Niels Winther, Jóannes Patursson og so sjálvsagt Tróndur í Gøtu. Ansað verður væl eftir umdøminum hjá hesum hetjum og royndir at endurskoða hetjumyndirnar verða vanliga ikki tiknar væl upp. Tað er líkasum ikki ráð til at finna og siga sannleikan, fyrr enn fullvelsstríðið er av. Vit kunnu tó loyva okkum at staðfesta, at Tróndur má hava verið ein sterkur mótstøðumaður hjá norsku imperialismuni og ein stórur meinbogi fyri tær kreftir, sum í Føroyum gingu ørindi fyri norska kongs- og kirkjuvaldið, ið strembaðu eftir yvirvøldum í Norðurhøvum. Hví skuldi høvundin til tær tekstir, sum mynda Føroyingasøgu annars nýtt so nógva orku at avmynda Trónd, sum hann nú einaferð ger. Hóast hugburð høvundans eydnast honum ikki at avmynda Trónda sum ein vandamiklan heidning, tí hann kann ikki annað enn endurgeva kreddu Tróndar, sum mann vera eitt hitt vakrasta sálmaørindi á føroyskum:

*Gangi eg ei eina út,*
*ýra mær fylgja,*
*fimm Guds einglar;*
*beri eg bøn fyri mær,*
*bøn fyri Kristi*
*syngi eg sálmar sjey,*
*síggi Gud yvir luta mín.*

Tróndur hevur havt so stóran týdning fyri føroysku tjóðskapar- og sjálvstýrisrørsluna, at allir føroyingar unna honum standmyndina. Vit ynskja Gøtufólki og øllum føroyingum tilukku við standmynd og Tróndardøgum.

**Sosialurin**

## Enn betri heilsukor til tey eldru



ELSEBETH GUNNLEYGSDÓTTUR HANSEN

Leikluturin hjá teimum eldru í samfelagnum er sera nógv broyttur hesi seinnu árini og krøvini eru eisini ørðvísi enn tey vóru fyri fáum árum síðani. Hugsa vit um eldraøkið eru tað fleiri góð tilboð, sum eru komin hesi seinnu árini, og sjálvandi tí hettar er neyðugt fyri at samfelagið skal virka fullgott.

Vit hava fingið røktarheim og sambýlir. Felagsskapirnir Hugni og Dagtilhald, sum gera eitt sera gott og ríkt arbeiði í Klaksvík, har eldri kunnu koma saman og hugna sær. Eisini er tilhaldið á Búðutrøð, sum er eitt stað fyri fólk, sum so smátt eru farin at gloyma, har starvsfólkini hava nógva vitan innan hetta økið. Støðan kann tó gerast munandi betur.

Viðgerðarhættirnir og møguleikarnir eru nógv betri í dag enn fyri fáum árum síðani. Hettar viðførir so aftur, at fólkið livir longri enn fyrr.

Men at liva longri er ikki nokk. Vit vilja øll hava eitt gott kvalitetslív, líka mikið aldur.

Og tað er her eg hugsi um fyribyrgjandi arbeiði. Oftani tykist fyribyrgjandi arbeiði sera tungt og dýrt í byrjani, men tað gongur sjáldan long tíð, áðrenn hettar er vunnið innaftur.

Eitt hugskot er, at Klaksvíkar Kommuna, gevur øllum borgarum 67 ár og eldri tilboð um, at ein sjúkrarøktarfrøðingur kann koma við jøvnum millumbili at tosa við tey, og kanna teirra heilsustøðu. Somuleiðis, sum hesi eldru undir vitjani hava møguleika at spyrja sjúkrarøktarfrøðingin um ymiskt fyrifallandi.

Hesi tilboð fara óiva at hava við sær, at um einum feilar eitthvørt, verður tað avdúkað meðan tíð er, sum aftur ger, at tað skal ikki nógv til, at viðkomandi heldur fram við einum góðum kvalitetslívi.

Og hevur tú eitt gott lív við góðari heilsu, ert tú førur fyri stórt sæð alt, sjálvt um aldurin er hár. Um tú hevur hug at fara til arbeiðis, gert tú tað, somuleiðis sum tú eisini kann luttaka í ymiskum frítíðarítrivum.

Ikki dámar mær væl at rokna í krónum og oyrum, tá ið vit hugsa um eldraøkið. Men eg kann ikki lata vera við at nevna, at um Klaksvíkar Kommuna setir ein sjúkrarøktarfrøðing í starv, kostar tað minni í løn um árið, enn eitt røktarheimspláss.

Hettar átakið er roynt aðrastaðni við sera góðum úrslitum.

Og vónandi vil Klaksvíkar Kommuna seta hettar í verk her norðuri.

## Karaktermorð sum politiskt vápn



EDMUND JOENSEN
løgtings- og fólkatingsmaður

**Heldur enn at fyrihalda seg reiðiliga til politikkin, velur Høgni Hoydal at royna at undirgrava trúvirðið hjá politiskum mótstøðufólkum. Framferðin er djúpt óseriøs, men í Tinginum eru vit von við, at Høgni Hoydal brúkar karaktermorðið sum politiskt vápn**

Eftir 10 ár í Tinginum er politiska høvuðsvápnið hjá Høgna Hoydal framvegis hitt sama væl kenda, nevniliga at karaktermyrða politisk mótstøðufólk og starvsfelagar.

**Hini eru órein og lúgva**

Mannagongdin hjá Hoydal tykist vera tann sama hvørja ferð. Tá hann kemur í politiskan andróður og manglar saklig politisk argument, fremur hann karaktermorð. Hann leggur mótstøðufólk síni undir bæði líkt og ólíkt.

Siktið við karaktermorðinum sum politiskt vápn er at undirgrava trúvirðið hjá mótstøðufólkum og á tann hátt at flyta fokus frá egnum politiskum gerðum ella mistøkum.

Í lesarabrævi í bløðunum leygardagin 5. juli skuldsetur landsstýrismaðurin í uttanlandsmálum undirritaða fyri at bera ósannindi um tað, sum fór fram á Chrsitiansborg framman undan 11. juni í ár.

Hetta var dagurin, tá umhvørvisnevndin í Fólkatinginum tók formliga avgerð um at taka undir við einum uppskoti í Altjóða Hvalaveiðunevndini (IWC) um at stovna eitt stórhvalareservat á sunnaru jarðarhálvu.

Mynstrið er hitt sama. Tá maðurin er kroystur, eru tað hini, sum eru órein og lúgva. Hetta er ikki einum landsstýrismanni verdugt og minnir um barnalótir.

Eftir ríkisfundin herfyri ásannaðu bæði Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, og Jóannes Eidesgaard, løgmaður, at landsstýrið og Norðuratlantsbólkurin, har Tjóðveldi hevur lim, hava gjørt ov lítið til tess at ávirka samstarvsfelagar í Fólkatinginum í spurninginum um hvalareservatið.

Reaktiónin hjá Høgna Hoydal var kend frammanundan – nevniliga at skuldseta Fogh fyri ósannindi og spindoktarí og at tiga orðini hjá løgmanni burtur. Karaktermorð og fokusflyting.

Vinfólkini hjá Høgna gingu móti landsstýrinum

Undirritaði vil ikki spilla tíðina hjá lesaranum við at leggja seg út í eitt ófruktabart kjak við landsstýrismannin.

Tey, sum vilja hava tann rætta samanheingin uttan grugg frá Høgna Hoydal, kunnu lesa útførligu greinina í Dimmalætting tann 28. juni undir yvirskriftini ”Sjúrður Skaale eigur apuna”. Sama grein er at finna her: www. dimma.fo/bloggan/edmundjoensen

Tó vil eg vísa aftur skuldsetingunum um at bera ósannindi.

Í stuttum kann staðfestast, at tað var partur av Norðuratlantsbólkinum og politisku vinfólkini hjá Høgna Hoydal í Danmark, sum bóru málið um stórhvalareservatið ígjøgnum Fólkatingið.

Høgni Hoydal gjørdi onki fyri at ávirka síni politisku vinfólk í Danmark upp undir avgerandi fundin um stórhvalareservatið á Christiansborg tann 11. juni í ár.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.